gult16 cyan16 magenta16 svart16

Vágbingar við røttum ryggi til Hvítarusslands

VB hevur neyvan møguleika at spæla seg víðari í kappingini, men avrikið mikukvøldið tænti avgjørt føroyskum fótbólti til heiðurs

EUROPA CUP FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

VB vann mikukvøldið føroyskum fótbólti eitt stig í Europa Cup fótbólti. Tað er at frøðast um, tí tað er ein veruleiki, at hetta er ikki nakað, sum kemur fyri á hvørjum ári. Í fjør spældu føroysk feløg seks Europa Cup dystir og tveir Intertoto Cup dystir. Føroyingar taptu allar dystirnar, og málmunurin var 1–25!

Í ár tykist ganga eitt vet betur. Í Intertoto Cup megnaði B68 2–4 á heimavølli og málleysan javnleik í Lokeren í Belgia. Og mikukvøldið megnaði VB málleysan javnleik.

Rættur hugburður

Vágbingar fóru undir altjóða uppgávuna við røttum hugburði. Eftir at fyrsti fjálturin var runnin av, var einki at rafla um. Teir taklaðu, so tað sang eftir í, og sjálvt um fremmanda menninir høvdu bóltin nógv, og nógv gekk fyri seg á VB hálvuni, so megnaðu VB menninir at halda mótstøðumonnunum frá at koma til upplagdar málmøguleikar.

Í framrættaða spælinum var ikki tann tyngdin í, sum er neyðug, um hóttanin ímóti mótstøðumálinum skal vera støðug. Robert Cieslewic og Birgir Jørgensen vóru rættuliga einsamallir frammi á vøllinum. Miðvallararnir lógu ofta aftarlaga, og tá álopsmenninir fingu tak á onkrari av longu sendingunum, vóru teir ofta noyddir at bíða eina løtu, áðrenn viðspælararnir komu framvið.

Í síðunum vóru Palli Augustinussen og Jón Pauli Olsen góðir bóltspælarar, og onkra ferðina megnaðu vágbingar at leggja bóltar innfyri, men tá var tað, tí álopsmenninir báðir hjálptu til í borðunum, og tískil spurdist einki burturúr.

Tríggjar ferðir var um reppið, at VB fekk mál. Tá tað restaðu fimm minuttir av fyrra umfarinum fangaði Palli Augustinussen tvær ferðir bóltin, tá mótstøðumenninir vóru á veg í álop. Fyrru ferðina royndi Palli sjálvur við skoti úr fimtan metrum, men málverjin tveitti seg og bjargaði til horna. Seinnu ferðina spældi Palli til Birgir Jørgensen, sum var leysur mitt fyri. Málverjin hálvbjargaði, og Robert Cieslewic var akkurát ov seinur til returbóltin.

Tá tað leið fram ímóti dystarenda, og vágbingar – væl uppmuntraðir av hugagóðu áskoðarunum úr Vági

Marek Wierzbicki gjørdi eitt gott arbeiði á miðjuni.

– stríddust fyri lívinum, var um reppið, at teir skoraðu. Jón Gærdbo, sum var sera raskur í miðverjuni, sendi fríspark fram í brotsteigin. Birgir Jørgensen stútaði upp á tvørs, og úr seytjan metrum heilflutaði Tórður Holm dygst omanfyri málið.

Lítið vandamiklir

Slavia Mozyr var væl betri fótbóltseind við denti á spælinum, enn vágbingar vóru tað. Tveir metra maðurin á sentrala miðvøllinum, Alexandar Pantic, var saman við aftasta verjumanninum og liðformannin Oleg Samatov, sum ofta flutti seg fram, við í nógvum eitt tvey samanspæli, og teir royndu nógv við krossrenningum og yvirlappi, men teir vóru ikki serliga vandamiklir. Ofta spældu teir mitt fram eftir, og tað høvdu vágbingar avgjørt einki ímóti, tí miðverjan stóð væl. Gjøgnumbrotini í síðunum vóru fá – eisini tí, at vágbingar dugdu væl at skerma av – og harvið vóru vandamiklu innleggini ikki so nógv.

Slavia Mozyr fekk eina rúgvu av hornaspørkum, men teir fingu einki burturúr teimum. Onkra ferðina royndu teir við langskotum, men tey flestu vóru óneyv og fóru omanfyri málið. Og tá teir endiliga raktu á málið, vardi Bjarni Johansen væl.

Undan dystinum nevndu vit, at álopsmaðurin Roman Vasiliuta var sera vandamikil. Landsliðsmaðurin, sum fyri stuttum skoraði sigursmálið í 2–1 sigrinum á Noreg, var ikki við í Føroyum. Hann er ikki væl í øgn við felagið, og hann er settur á sølulistan. Um hann verður á liðnum komandi mikukvøld var ikki greitt, tá fremmanda menninir fóru úr Gundadali.

Framtíðin

Stóri spurningurin hjá VB og føroyskum fótbólti er nú, hvussu tað fer at hilnast komandi mikukvøld. Hitastigini í Hvítarusslandi liggja omanfyri tey 30, og VB skal ferðast leingi. Teir fara úr Føroyum sunnumorgunin og fara beinleiðis víðari til Warzawa.

Hagani skulu teir seinni sunnudagin við bussi teir 650 kilometrarnar til Mozyr. Tann teinin eiga teir at megna, soleiðis at teir eru á staðnum tíðliga mánamorgunin. Men ein óvissur er við í spælinum. Tað er bíðitíðin við markið. Bíðirøðin sigst vera ógvuliga long á markinum ímillum Pólland og Hvítarussland. Vit mugu vóna, at hon ikki fer at ganga útyvir VB ferðalagið og harvið fyritreytirnar at standa seg hampuliga í nógva summarhitanum og undir fremmandu umstøðunum.

Mikukvøldið gav VB (alt ov fáu) føroysku fótbóltsáskoðarunum eina góða løtu í Gundadali. Tær hava ikki verið so nógvar í Europa Cup høpi, og tí var tað hugaligt. Góða eydnu í Hvítarusslandi!

Petrovic var ikki heilt misnøgdur

Royndi venjarin hjá Slavia Mozyr segði seg vera nøgdan við spælið hjá sínum monnum, men hann var ikki nøgdur við royndirnar ímóti málinum

EUROPA CUP FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tað var ein 46 ára gamal maður við nógvum royndum í altjóða fótbólti, sum hevði ábyrgdina av Slavia Mozyr mikukvøldið. Vladimir Petrovic er jugoslavi. Hann hevur spælt við Reyðu Stjørnuni í Beograd, og hann hevur verið á jugoslaviska landsliðnum í nógv ár.

Longu í 1974, tá HM endaspælið var í tí, sum tá kallaðist Vesturtýskaland, umboðaði Petrovic, sum bara var 18 ára gamal og næstyngsti spælarin yvirhøvur í endaspælinum, á jugoslaviska landsliðnum. Og hann var eisini á landsliðnum, tá Jugoslavia luttók í endaspælinum, sum var í Spania í 1982.

Tað var eftir hetta seinna endaspælið, at Petrovic varð seldur til størsta London felagið, Arsenal, har hann var fastur fúsur eitt skifti.

Ovfarin av VB

Tá vit spyrja jugoslavan, um mótstøðuliðið spældi soleiðis, sum hann hevði ímyndað sær, at teir fóru at gera, so svarar hann soleiðis:

– Út frá tí, sum eg visti um fótbólt her á leið, hevði eg roknað við, at mótstøðumenninir fóru at spæla meiri í luftini og at vera meiri ágangandi í fysiska spælinum, enn teir vóru. Men eg má undirstrika, at eg kendi sera lítið ella rættari sagt einki til mótstøðuliðið. Nú havi eg havt høvi at kanna teir í 90 minuttir, og tað fara vit vónandi at fáa nyttur burturúr, tá vit fara at spæla á heimavølli komandi mikukvøld.

Vladimir Petrovic sigur seg ikki vera misnøgdan við spælið hjá sínum liði, men hann var ikki nøgdur við royndirnar ímóti málinum:

– Skotini vóru alt ov óneyv, og vit fingu einki burturúr innleggunum. Eg haldi, at eg taldi 24 hornaspørk til okkara menn, og tað er ov vánaligt, at tað ongantíð spurdist nakað burturúr.

Venjarin heldur ikki, at tað var nøkur katastrofa fyri hann og Slavia Mozyr, at teir ikki vunnu mikukvøldið:

– Í Europa Cup høpi var hetta fyrri hálvleikur. Seinni hálvleikur verður í Hvítarusslandi komandi mikukvøld. Tað ræður um at vera omaná, tá báðir dystirnir eru spældir, og eftir dystin í kvøld haldi eg, at vit kunnu rokna við tí, segði Vladimir Petrovic, sum kendi seg klókkan, tá málverjin hjá honum gjørdi tvey stór mistøk.



Robert Cieslewicz spældi ein góðan dyst.

Kunnu bara droyma um Bratislava

Vælnøgdi VB venjarin vónar, at hansara fara at vísa sama hugburð komandi mikukvøld og ikki minst, at hann verður at síggja í landskappingini

EUROPA CUP FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Venjarin hjá VB, var væl nøgdur við avriki hjá sínum monnum.

Popczynski ásannaði tað eftir dystarlok. Tað hevði verið hugaligt, um venjarin sjálvur hevði havt verið á vøllinum, men tað bar ikki til, tí skaðin ger so nógv um seg. Tá vit spyrja, um Popczynski kanska hugsar um, at dreymurin hjá honum um at spæla í europeisku meistarakappingini kann gerast til veruleiki í Hvítarusslandi komandi mikukvøld, og harvið at VB kundi spælt ein ordligan trumf út, so sær hann ikki ljóst upp á tað.

– Eg havi ikki fingið vant sjálvur í nógvar vikur, so eg verði undir ongum umstøðum á toppinum. Tað hevði kanska verið gott, um eg kundi spælt síðsta hálva tíman, men tað fer neyvan at bera til, tíverri.

Tvær deildir á muni

Popczynski er ein jarðbundin venjari. Sjálvandi hevði tað stóran týdning, at mótstøðuliðið ikki fekk útivallarmálið, sum hevur so sera stóran týdning í Europa Cup fótbólti. Um VB komandi mikukvøld í Hvítarusslandi megnar at skora eina ferð, so verður tað neyðugt hjá Slavia Mozyr at skora tvær ferðir fyri at koma víðari.

– Eg kann ikki vera annað enn nøgdir við tað, sum mínir spælarar vístu í kvøld. Eg kenni eitt sindur til fótbólt í Hvítarusslandi, og tað er eingin ivi um, at støðið í bestu deildini har í miðal er minst eina og helst tvær deildir høgri enn støðið í bestu deildini í Føroyum. Tí kunnu vit ikki annað enn vera nøgdir við javnleikin í kvøld.

Droymir tú um at spæla í Bratislava í næsta innleiðandi umfarinum?

– Tað hevði verið áhugavert. Skulu vit røkka næsta umfarinum, so skulu vit vit vinna ella megna javnleik, har tað verða skorað mál. Vit fara at gera okkara besta, men umstøðurnar vera ikki okkum til fyrimunar. Hitastigini har niðri eru nú omanfyri 30, og umstøðurnar annars fara at kennast rættuliga fremmandum, men vit fara at gera okkara besta.

Gagnið

Tá vit spyrja VB venjaran, hvat hann heldur, at hann fyrst og fremst kann brúka avrikið mikukvøldið til, so eru venjarin og VB formaðurin Mannbjørn Tausen púra samdir:

– Í kvøld vísti liðið sera góðan hugburð. Um avrikini í landskappingini eftir summarsteðgin verður farið undir aftur norsku landskappingina, verður avbjóðingin hjá Jákupi so stór, sum tað ber til í Noregi. Tá skal Molde spæla á heimavølli ímóti sjálvum Rosenborg. Felagið í Tróndheimi hevur seinastu nógvu árini átt besta fótbóltsliðið í Norðurlondum.

Ert tú nóg væl fyri at spæla á so høgum støði?

– Eg havi ikki vant síðani síðst í juni, burtursæð frá at eg havi runnið sjálvur. Nú fari eg at venja við onkrum felag her á leið. Tað er Jacob Friis Hansen, sum hevur verið millummaður, og hann skal syrgja fyri, at eg fái vant hesar dagarnar, áðrenn eg fari til Molde aftur, sigur Jákup Mikkelsen, sum í fyrsta umfari fer einsamallur til Molde, har hann skal kappast við tveir minni royndar spælarar um plássið millum stólparnar.

jh

Jákup er ovurfegin

Fyrsti dysturin hjá Molde, eftir at teir hava keypt Jákup Mikkelsen, verður annan sunnudag á heimavølli ímóti Rosenborg

Mikukvøldið var tað greitt. Norska tippuligafelagið Molde og Jákup Mikkelsen eru samd um treytirnar fyri, at føroyski landsliðsmálverjin skal verja málið hjá Molde. Í fyrsta umfari gongur sáttmálin fram til 1. desember. Norska kappingarárið endar fyrst í november.

Felagið sigur seg hava havt ringar royndir av, at fremmandir spælarar ikki hava trivist í Molde. Um tað gongst væl, og partarnir báðir verða nøgdir við hesar fyrstu mánaðirnar, so er lagt upp til, at samstarvið skal halda fram. Einki er likið út um peningaliga partin í sáttmálanum, men vit skilja á Jákupi, at hann er nøgdur við avtaluna.

– Eg kenni hetta sum ein stóran lætta. Tað hevur verið nógv skrivað og tosað um, hvar eg skal spæla í framtíðini, og eg havi sjálvur verið so nógv upptikin av hesum, at tað als ikki hevur verið møguleiki fyri at hugsa um fótbóltsspælið og um at venja, sigur Jákup Mikkelsen, sum sunnudagin ella mánadagin fer aftur til Noregs.

Og longu annan sunnudag, tá tað eftir stutta summarsteðgin verður farið undir aftur norsku landskappingina, verður avbjóðingin hjá Jákupi so stór, sum tað ber til í Noregi. Tá skal Molde spæla á heimavølli ímóti sjálvum Rosenborg. Felagið í Tróndheimi hevur seinastu nógvu árini átt besta fótbóltsliðið í Norðurlondum.

Ert tú nóg væl fyri at spæla á so høgum støði?

– Eg havi ikki vant síðani síðst í juni, burtursæð frá at eg havi runnið sjálvur. Nú fari eg at venja við onkrum felag her á leið. Tað er Jacob Friis Hansen, sum hevur verið millummaður, og hann skal syrgja fyri, at eg fái vant hesar dagarnar, áðrenn eg fari til Molde aftur, sigur Jákup Mikkelsen, sum í fyrsta umfari fer einsamallur til Molde, har hann skal kappast við tveir minni royndar spælarar um plássið millum stólparnar.

jh

Jákup er fegin um, at hava fingið eina avtalu við Molde.

Hagtøl

Europa Cup fyri meistarar

1. innleiðandi umfar – 1. dystur

VB–Slavia Mozyr 0–0

Á Tórsvølli mikudagin 11. juli 2001 kl. 19.00
514 áskoðarar

Dómarakvartett úr Norðurírlandi: David Malcolm, Brian Kane, Michael McLaughlin og Stephen Weaterall
UEFA umboðsmaður úr Sveis: Edgar Obertüfer
Dómaraeygleiðari úr Týskaland: Aron Schnidhüber

VB: 1. Bjarni Johansen – 13. Predrag Zivkovic (12. Marner Richardt, 57.), 11. Jón Gærdbo (18. Gisli Sveinbjørnsson, 90.), 4. Eyðun Jacobsen, liðformaður, 2. Magni Jacobsen – 9. Palli Augustinussen, 14. Marek Wierzbicki, 10. Tórður Holm (6. Michael í Lágabø, 88.), 20. Jón Pauli Olsen – 19. Birgir Jørgensen, 15. Robert Cieslewicz
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 16. Finnbogi Olsen, 5. Oliver Abrahamsen, 7. Dan Djurhuus, 17. Kári í Lágabø
Gult kort: Predrag Zivkovic 33.
Venjari: Krysztof Popczynski
Hjálparvenjari: Páll Augustinussen
Liðleiðari: Kári Poulsen
Fysioterapeutar: Kirsten Ludvig og Turid Kjærbo

Slavia Mozyr: 21. Vitali Varyvonchyk – 2.Vladimir Sarachynski, 6. Oleg Samatov, liðformaður, 14. Ruslan Daniliuk – 4. Artur Matveychik (8.Alexandar Gruber, 56.), 17. Radojica Vasic, 20.Alexandar Pantic, 3. Fedor Loukachenko, 13.Zivorad Djordjevic – 9. Nebojsa Jocovic (24.Kirill Rybakov, 46.), 11. Valery Strypeiki
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 1. Siarhei Sinitsyn, 7. Vladzimir Karytska, 12. Ihar Balin, 16. Andrei Lukashevich, 19. Dzmitry Chalei
Gult kort: Radojica Vasic 18.,Fedor Loukachenko 84.
Venjari: Vladimir Petrovic
Hjálparvenjarar: Andrei Sasnitski og Zeljko Boljevic

Seinni dysturin verður í Mazyr mikudagin 18. juli

gult17 cyan17 magenta17 svart17